Álit

í

løgtingsmáli nr. 116/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum (Hægri fíggjarkarmur)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 17. apríl 2024, og eftir 1. viðgerð 30. apríl 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. og 7. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Fróðskaparsetrið, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Landsverki.

Nevndin hevur viðgjørt málið um at hækka játtanina til at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, so at mesta upphæddin, ið landsstýrismanninum verður heimilað at nýta, hækkar úr 24 mió. kr. til 37 mió. kr. Sambært lógartekstinum skal peningurin nýtast til byggiútreiðslur íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, umframt útreiðslur til at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

Lógin fevnir um lon 5, og nú takið er liðugt, og útveggirnir eru í gongd, og restin av arbeiðinum við lon 5 hevur verið í útboði, er klárt at fara í holt við timbur-, snikkara- og niðurtøkuarbeiði, mála- og múraraarbeiði, gólvarbeiði, HVS og ventilasjónsarbeiði, EL-arbeiði og kloakkarbeiði.

Undir viðgerðini er komið fram, at stýrisbólkur er settur at stýra allari gongdini við umvælingini, m.a. fyri at fíggjarstýra játtanum heilt neyvt.

Gjørt er vart við, at lutfalsliga dýri ráðgevarakostnaðurin er lutvíst vegna tær umbidnu samlaðu loysnirnar fyri allar lonirnar, sum kunnu endurnýtast til restina av verkætlanini, og vegna at arbeiðið tí hevur tikið longri tíð. So tí eigur ráðgevingarkostnaðurin sambært hoyringunum at verða minni til restina av verkætlanini.

Tá lógin varð samtykt á vári í fjør, varð eisini tikið undir við at gera eitt fyribils parkeringsøki á fløtuni, og nú tað er liðugt, er greitt, at kostnaðurin av hesum var 2,7 mió. kr. í mun til metta kostnaðin á vári í 2023 à 2 mió. kr.

Nú alt er boðið út og summar verkætlanir framdar, sigur uppskotið, at kostnaðurin fyri lon 5 er 34,1 mió. kr. ella 2,8 mió. kr. meira enn áður mett. Harav eru handverkaraútreiðslurnar 0,8 mió. kr. hægri, og útreiðslurnar til prosjektering og ráðgeving 2,1 mió. kr. hægri eins og innbúgv fyri 0,1 mió. kr. er

komið afturat og óvissan er 0,2 mió. kr. lægri. Nevndin hevur fingið at vita, at eftir verandi gongd og ætlan kann væntandi verða flutt inn í lon 5 móti sumri í 2025.

Harumframt verða 200 tús. kr. settar av til at gera heildarætlan fyri samlaðu høvuðsumvælingina og umbyggingina í øllum skúlabygninginum á Frælsinum, og henda upphædd kundi tykst heldur lág til so umfatandi arbeiði. Men undir viðgerðini er komið fram, at Setrið eisini nýtir eini 200 tús. kr. av síni rakstrarjáttan, tí arbeiðið er eitt samstarv millum Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Landsverk og so Fróðskaparsetur Føroya, sum er týdningarmikil partur av at allýsa, hvat virksemi hjá stovninum hvør lon skal nýtast til og harvið umvælast og umbyggjast til.

Upplýst er fyri nevndini, at heildarætlanin skal vísa, hvussu lonirnar skulu brúkast og dagførast; hvat møguliga skal byggjast afturat o.a. Nógvar royndir til hetta arbeiðið eru longu fingnar og fáast við arbeiðinum við lon 5. Heildarætlanin fyri skúlabygningin á Frælsinum (Frælsi 20) skal vera liðug tíðliga í heyst. Hon skal m.a. lýsa, hvussu t.d. tvær deildir hjá Setrinum skulu hýsast har við øllum teimum hentleikum, sum hartil hoyra, hvussu nógvir fermetrar skulu setast av til hvørt, og um fermetrar skulu leggjast afturat.

Út frá hesi meting er upplýst fyri nevndini, at ein nýggj verklagslóg fyri restina av arbeiðinum kann verða klár til at leggja fyri Løgtingið á vári í 2025. Samstundis er nevndin kunnað um, at talan kann verða um at fremja restina av høvuðsumvælingini og umbyggingini við meiri enn einari verklagslóg. Um so verður, fer verklagslógin, sum væntandi verður løgd fyri Løgtingið á vári í 2025, at fevna um nakrar lonir og ikki allar.

Um tíðarætlanina hevur nevndin fingið at vita, at tá arbeiðið gongur regluliga, so tekur tað umleið eitt ár at umvæla hvørja lon. So samlaða verkætlanin tekur umleið eins nógv ár, sum talið á lonum er; sjey. Men um Setrið kann klára seg uttan tvær lonir okkurt ár, so kann arbeiðið harvið verða stytt við einum ári hvørjaferð.

Nevndin ger greitt, at tá ið tann nýggja verklagslógin verður løgd fyri tingið á vári í 2025, tá er umráðandi, at politiski myndugleikin greitt fær at vita, hvat gerast skal fyri at fáa høvuðsumvælt og umbygt skúlabygningarnar á Frælsinum, íroknað neyvan kostnað fyri komandi arbeiðið og kostnað fyri samlaðu verkætlanina. Eisini er av stórum týdningi at fáa sett áramál á verkætlanina, hvussu nógvar lonir vera gjørdar samstundis, um tað verður ein ella fleiri verklagslógir, saman við eini samlaðari løguætlan, sum greitt vísir, at peningur verður tøkur til ætlanina.

At enda er upplýst fyri nevndini, at játtanin fyri 2024 væntandi røkkur til tann partin av arbeiðinum eftir hesi verklagslóg, sum eftir ætlan skal fremjast í ár. Nevndin viðmerkir, at tað er sera týdningarmikið, at lagt verður upp fyri neyðugu upphæddini fyri 2025.

Nevndin heldur tað vera sera týdningarmikið, at Fróðskaparsetur Føroya fær góðar karmar til sítt virksemi til frama fyri tey lesandi í Føroyum, fyri undirvísarar og granskarar eins og øll onnur starvsfólk á øllum deildum hjá Fróðskaparsetri Føroya. Nevndin metir eisini, at arbeiðið við lon 5 og við heildarætlanini, sum hendan verklagslóg fevnir um, eru týdningarmestu tættirnir í støðutakanini til, hvussu skal verða við restini av skúlabygninginum á Frælsinum sum parti av allari kampusætlanini.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 13. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	